

*Aldursmunurin er stórur, men hugnin tann sami. Og hugaligt er at halda seg at teimum, sum hava lívsroyndir at geva av*

teimum mongu tiltøkunum, tey hava hvønn mánadag og mikudag frá klokkan tvey til fimm seinnapart.

Tað kunnu vera bæði friðalig og meira lívlig tiltøk,sigur hon. Teimum dámar væl at spæl boccia, sum tey vanliga spæla í ungmannfelagshúsinum, tí har er plássið best. Men so eru tað dagar, tá tey heldur sita og práta, binda, lesa ella lurta eftir upplestri. Onkra spurnarkapping hava tey havt, og so verður tað annars, sum tað kemur.

Útferðirnar dámar teimum væl. Og tær hava verið fleiri. Bæði innan- og uttanlands.

Hendan dagin var tað meira fyri at vísa nýggju hølini fram, tey vóru møtt. Og dagurin var kanska eitt sindur øðrvísi enn vanligt. Har var fólk úr øllum ættarligðum. Frá tilkomnum pensionistum, umvegis hálvgamlar og yngri bygdarráðslimir, heilt niður til børn undir skúlaldur.

Kvinnurnar vóru so avgjørt í meiriluta. Menninir vóru bara nakrir heilt fáir. Onkur helt, at teir høvdu betri hug at fáast við seyð og tosa um fisk onkra aðrastaðni. Men treyðugt so. Onkur var møttur kortini. Men teir sóu eitt sindur forfjónaðir út, har teir sótu á einum bonki fram við vegginum, meðan damurnar hildu seg at borðinum, sum noðað kundi liggja á, meðan bundið varð, samstundis sum tær prátaðu.

Tiltakið byrjaði við, at borgarstjórin sjálvur triði úr bygdarráðnum koma við stórari blómuheilsan og eisini helt eina stutta røðu, har hann endaði við eini lítlari yrking, hann hevði fest á kortið, sum fylgdi við heilsanini.

Aftan á var boðið ábit. Pinnamatur og kransakøka frá bakaranum á Sandi, sum ger bestu kransakøkur í verðini. Tí ivast tey ikki í á Sandi.

## Kommunuhús

Sands Kommuna hevur keypt eini stór sethús á Sandi fyri 1,4 millión krónur, sigur Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri á Sandi. Húsini fara at verða brúkt til at hýsa kommunuskrivstovuni, eldratilhaldinum, kunningarstovuni og ætlandi eini avgeiðslu hjá Almannastovuni nakrar dagar um vikuna.

Tilhaldið Hugnin hevur fingið ta stóru stovuna at vera í, eins og tey hava felags brúksrætt til køkin saman við øðrum, sum fara at vera í húsinum.

Húsini eru rúmlig, og góðir møguleika eru at innrætta tey til skrivsovuendamál uttan at gera tær stóru broytingarnar. Tey liggja væl fyri mitt í bygdini beint við bankan.

–Tó hevði kanska verið best fyri pensionistarnar, um tey høvdu kunnað verið í kjallaranum. Men hildið varð, at hølisviðurskiftini í erva vóru betri. Og ikki er tað verri enn so, at ein trappulyft væl kann gerast uttanfyri, um tað gerst ov møtimikið at ganga trappurnar, sigur Páll á Reynatúgvu, borgarstjóri.



*r saktans at gerast nýtt ítriv í Hugnanum. Leiðarin hevur júst fingið ð talv sum gávu til tilhaldið*



*Pinnamatur og »verðins besta kransakøka« vóru á borðinum*



*Nógvar myndir frá øðrum tiltøkum eru at hyggja at*



*ava tað stuttligt*



*Hesin kom í rættiligt konugildi eins og Álva Jógvan á sinni*